# Her er einki at gera

**Tey ungu í Sandavági samlast uttan fyri kioskina um kvøldið. Tey hava onga aðrastaðni at fara, siga tey, og tey tíma heldur ikki sjálv at finna upp á nakað**

MIKUKVØLD Í SANDAVÁGI
*Emma Hansen, praktikantur*



*Ungfólk uttan fyri kioskina í Sandavági.Tey hava onga aðrastaðni at fara og tíma heldur ikki at finna upp á nakað sjálv, siga tey*

*Mynd: Emma Hansen.*

Í Sandavági, uttanfyri kioskina hjá Sønrup, var Sosialurin og spurdi tey ungu hvat tey gjørdu, og hví tey stóðu har.

– Tað er einki annað tilhaldsstað í bygdini, so vit standa og fáa okkum eitt lítið prát inn ímillum. Tað er betri at standa her enn at sita heima og einki gera.

Vit spurdu um hvat tey

*Framhald á síðu 15*


## Støðleiðari til Shell í Klaksvík

Í sambandi við at P/F Føroya Shell yvirtekur Shell Quick Service frá Dávu Joensen og at avgreiðsluskrivstovan í Norðoyggjum samstundis verður flutt av Grótrætt inn á støðina, verður við hesum søkt eftir leiðara.

**Starvið:**
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum bæði fevnir um dagligu leiðsluna av Shell-støðini, av øllum søluarbeiðinum, rakstrinum og av umsiting okkara í Norðoyggjum. Samstundis umfatar starvið eisini ábyrgdina av goymsluni á Grótrætt.

**Eginleikar:**
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ógrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- hevur støðkunnleika
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar
- tekur undir við handilsmeginreglunum hjá Shell (sí www.shell.fo)

**Løn:**
Vit bjóða eina góða løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

**Umsóknir:**
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Leiðari Klaksvík" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 30. sept. 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Líðo, sølu- og marknaðarleiðara ella Hákun Djurhuus, stjóra á telefon 347400.

P/F Føroya Shell hevur deildir í Klaksvík, Suðuroy, Eysturoy og Tórshavn. Tað eru 10 Shell-støðir kring landið og uml. 100 fólk starvast hjá Shell í Føroyum. Shell eigur og rekur eisini tangabátin "MAGN". Árliga umsetur Shell fyri uml. 400-500 mió kr. Virksemið hjá Shell í Føroyum hevur síðani 1973 verið í føroyskum partafelag, sum er ein partur av Royal Dutch Shell.

www.shell.fo



## Vælkomin í føðingardag!

**Eg haldi føðingardag frá 16. til 20. september! Í føðingardagsvikuni vitji eg allar Føroya Banka-deildirnar. Kom inn og ynsk mær tillukku! Hevur tú sparikistilin við, seta vit peningin inn á tína Nósakonto, og tú fært eina føðingardagsgávu við heimaftur!**

**Her sært tú, nær eg vitji tína deild:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | Klaksvík | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 10.30-11.00 |
| | Klaksvík | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| Eysturoy | Eiði | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | Norðskáli | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Gøta | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | Leirvík | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Fuglafjørður | Mikudagin | 18-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Saltangará | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 10.30-11.00 |
| | Toftir | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Saltangará | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 16.30-17.30 |
| | Skáli | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | Strendur | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| Vágar | Miðvágur | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Sandavágur | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 16.00-17.00 |
| | Sørvágur | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| Sandoy | Skopun | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 14.00-14.30 |
| | Sandur | Fríggjadagin | 20-09-02 | kl. 15.00-15.30 |
| Suðuroy | Hvalba | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 13.00-13.30 |
| | Vágur | Mánadagin | 16-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | Tvøroyri | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| Streymoy | Vestmanna | Týsdagin | 17-09-02 | kl. 14.00-15.00 |
| | Kollafjørður | Mikudagin | 18-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | N.Finsensgøta | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 10.30-11.30 |
| | Hornabeur | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 13.00-14.00 |
| | SMS | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 14.30-15.30 |
| | N.Finsensgøta | Hósdagin | 19-09-02 | kl. 16.30-17.30 |







# Ganga undir øll sett krøv

**Tey krøv, sum sett verða til undirsjóvartunnilin, fer leiðslan fyri felagnum sjálvandi at útfylla, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunnilin**

TUNNILSTRYGD
*Edvard Joensen*



*Stjórin fyri Vágatunlinum heldur framvegis, at tunnilin verður latin upp tann 26. november sum ætlað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er ingin ivi um, at tey krøv, sum sett verða undirsjóvartunlinum undir Vestmannasundi, verða uppfylt, sigur stjórin fyri tunlinum. Tað verið seg frá brunaumsjón ella øðrum.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunlinum, sigur, at tey framvegis arbeiða fram í móti, at tunnilin letur upp tann 26. november klokkan 11.00. Enn hevur nevndin ikki annað at halda seg til enn, at alt er klárt til ta tíð.

Um hvørjar avleiðingarnar verða, um okkurt krav ikki er uppfylt til tíðina, sigur hann, at so má handlast hareftir, tá støðan uppstendur.

– Skuldi tað hent, at tunnilin ikki verður klárur og hevur uppfylt øll tey krøv, sett verða, fara vit at boða frá tí. Og vit vilja fegnir gera tað so tíðliga sum gjørligt, um so verður, sigur hann.

Enn er tó eingin útgerð til sløkkiliðini, sum skulu inn í tunnilin, um eitthvørt hendir, keypt. Listin var ikki fingin til vega fyrr enn hósdagin.

## Fingið listan

Tað er gjørdur ein listi yvir ta útgerð, sum kravd er í samband við trygdina í tunlinum. Har undir eisini brunatrygdina. Talan er millum annað um ein brandbil og luftfløskur, sum í minsta lagi skulu hava luft til hálvanannan tíma hvør.

Samráðingar eru millum leiðsluna fyri Vágatunnilin og avvarðandi kommunur, um hvussu hetta skal skipast. Tær kommunur, ið hava ábyrgd av tunnilstrygdini, eru Kvívíkar- og Sandavágs Kommunur, har tunnilsmunnarnir eru.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sum umsitir Brunaumsjón Landsins, sigur, at krøvini til undirsjóvartunnilin eru millum annað, at føst vatnleiðing skal liggja gjøgnum tunnilin, ella eisini skal brandbilur við tanga vera tøkur. Hetta verður kravt, so atgongd altíð er til vatn, hvar í tunlinum ein møgulig vanlukka skuldi hent.

Nú er eingin føst vatnleiðing í tunlinum, og tí krevst tangabilur. Ein slíkan hevur Sandavágs Kommuna ikki, og tí má hann fáast til vega.

Ógreitt er tó, um tað er kommunan ella tunnilin, sum skal gjalda hendan bilin umframt aðra útgerð, sum brúkast skal í slíkum føri.

Dávur Reinert Hansen, sigur, at leiðslan fyri Vágatunnilin hevur boðið sær til at bera kostnaðin av tí, sum mett verður at liggja oman fyri tað, sum er eitt rímiligt krav til kommununa.

– Arbeitt verður við hesum málinum í løtuni, men eingin semja er fingin enn, sigur hann.

## Skeiðið útsett

Ætlanin var, at eitt brandskeið, við luttøku av brandmonnum úr Kvívík og Sandavági/Miðvági, sum hava felags sløkkilið, skuldi vera á Brandskúlanum við Áir í komandi viku. Á hesum skeiðnum skuldu teir millum annað læra at brúka ta útgerð, sum kravd er í sambandi við tunnilstrygdina.

Men av Brandskúlanum verður upplýst, at tað skeiðið er útsett, og sigur leiðarin á skúlanum, at ein grund, hann hevur fingið uppgivna, er at eingin útgerð er at venja við.

Tá soleiðis var, varð hildið líka frægt at taka onkran annan á skeið, og tí verður eingin brandvenjing fyri tunnilssløkkiliðsmonnum á hesum sinni.

Dávur Reinert Hansen sigur, at hann hevur frætt, at Brandskúlin hevur gjørt av at taka onnur fólk á skeið. Aðrar viðmerkingar vil hann ikki gera til tað málið.

Sjórin fyri Vágatunlinum hevur ongan hug at gera viðmerkingar til, hvat hendir tann 26. november, um brunaumsjónin tá framvegis krevur, at ymisk krøv skulu lúkast.

–Tað eru ov nógv »um« í hasum spurninginum til, at eg kann taka støðu til hann, sigur Dávur Reinert Hansen. Men vit fara sjálvandi at ganga undir øll sett krøv, og vit arbeiða framvegis við teirri stevnu, at latið verður upp tann 26. november klokkan 11.00.


*Ger vakurleika til veruleika*

ESTĒE LAUDER
16.-21. september



ESTĒE LAUDER
RING OG FÁ ÓKEYPIS TÍÐ

Umframt 2 kundakvøld: avmarkað pláss

parfumarí Drós
Bøgøta 15 • Boks 24
Tel. 314811 • Fax 314877